# E - og tónleikurin



**Kári Sólstein, útvarpsmaður**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Ja, massar. Horn, violin, guitar, trummur, klaver, you name it!

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Bert eitt. Kornet!

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Nei, ongantíð!
*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Nei, tað havi eg ongantíð droymt um!

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Onki sum so. Men eg lurti nógv eftir tónleiki!

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– Nakrar eru í Klaksvík, nakrar í Havn, nakrar í bilinum og so eisini tær, sum onkur hevur lænt, men ikki komin aftur við! So eg veit ikki, hvussu nógvar eru!

*Hvat er tín yndisfløga?*
– Havi tíanverri onga yndisfløgu! Men mær dámar fleiri sera væl!

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Hehe, tað tími eg ikki at siga. Men tað er ein føroysk fløga!

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– Kann ikki koma nakran til hugs, so eg veit ikki!

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– New Kids on the Block

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– Eg hevði valt onkran vælsvingandi, onkran lættan at syngja!

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Góður melodiøsur gemenur mainstream poppur!

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Líka mikið fyri meg, bara tað er melodiøst!

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Tónleikur, sum ikki hevur nakað ávíst lag, men er gjørdur bert fyri at provokera!

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– Onkur hjá Frændum!

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– Eg minnist ikki! Men man tað ikki verða onkur fittur barnasangur!

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
– Tríggir smáir dunnuungar!

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– Klaksvíkar Hornorkestur, lag nr. 13 úr reyðubók

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Rammstein á Roskilde festivalinum!

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– Aftur veit eg ikki reiðiliga, men kanska Jon Bon Jovi!

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Annika B. Mortensen, thisisannikab@yahoo.com
Til: post@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Al-Quaeda med alla?

Al-Quaeda gjørdi aftur vart við seg í vikuni sum fór. Hesaferð lótu nærum 300 shiamuslimar lív, meðan teir hildu halgidag fyri fyrstu ferð síðani Saddam Hussein varð rikin frá valdinum. Sæð við uttanríkispolitiskum brillum roynir Al-Quaeda at skapa irakiska mótstøðu ímóti vesturlensku hersetingini í Iraq og í einum størri perspektivi megnaði yvirgangsfelagskapurin aftur at minna heimin á at Al-Quaeda enn er virkið. Síðan 11. september 2001, sum førdi til at kríggj varð lýst móti yvirgangi, er heimurin broyttur. Vit liva í einum heimsumfatandi krígsøki, og um streymurin brádliga fer í einum vesturlendskum stórbýi, sum hendi í New York síðsta summar, kemur yvirgangur beinanvegin til hugs. Hvussu umfatandi, hvar og hvør er Al-Qaeda, og fer vesturheimurin nakrantíð at megna at beina fyri muslimska yvirganginum? Í eini roynd at svara hesum spurningunum havi eg kannað søguna hjá Afghanistan.

Í Afghanistan búgva nógvir ymiskir etniskur minniluta bólkar við ættarbondum til grannalondini, hetta kemst av at afghanska landamarkið varð ásett av bretum í hjá landatíðini. Ymisku ættarbólkarnar hava ígjøgnum allar tíðir stríðst móti hvørjum øðrum og Afghanistan hevur tískil altíð verið ávirkað av innanlandsstríði. Í 1979 gjørdi Sovjetsamveldið innrás í Afghanistan, har ein vinstravendur flokkur, PDPA, var við at missa valdið. Vesturheimurin, Pakistan, Iran og flestallir afghanar fordømdu innrðsina.

Amerika byrjaði beinanvegin at stuðla krígnum ímóti Sovjetsamveldinum. Amerikanar brúktu fregnartænastur í Egyptalandi, Saudiarabia og Pakistan til at venja, vápna, gjalda fyri og byggja upp eitt fleirtjóða net av stríðsfúsum muslimum at berjast í Afghanistan. Í 1980 vóru lýsingar at síggja í bløðum í Egyptalandi, har heitt varð á ungdómin um at koma við í "ferðamannafylgið" til Afghanistan.

Hesar vóru umstøðunar tá Osama bin Laden í 1986 byrjaði at útvega fólk til sína nýopnaðu herstøð, Al-Quaeda. Saudiarabia, Pakistan, Bretland og USA fegnaðust yvir at fáa fleiri hermenn, og tað vóru samstundis hesu londini ið vandu og vápnaðu Al-Quaeda. Osama bin Laden, sum var ein ríkur byggiverkfrøðingur frá Saudiarabia, kom til Afghanistan fyri at ganga ð odda fyri heilaga krígnum móti útheiminum. Fyri Osama bin Landen, og mong við honum, var nevniliga ikki einans talan um kríggj móti Sovietsamveldinum. Hann var viðhaldsfólk til eina vaksandi islamiska rørslu, sum tók seg upp sum eitt aftursvar ímóti uppílegging frá vesturlondum í muslimska heimin. Hendan islamiska rørslan kyknaði upp millum vónsvikin lesandi ð fróskapasetrum og tekniskum skúlum í muslimska heiminum. They vóru troytt av mannminkandi vesturlenskari uppílegging. Meðan Osama bin Laden stóð fyri venjingarleguni í Afghanistan komu meir enn 15.000 sjðlvboðnir saudiarabiskur menn í venjing hjá honum. Flesu teirra høvdu góðar útbúgvingar og góð almenn størv í heimlandinum.

Í Februar 1989 tók Sovjetsamveldið seg burtur úr Afghanistan. Amerika og onnur vesturlendsk lond sóu sigurin sum ein av teimum týdningarmiklastu í tí Kalda Krígnum, meðan muslimsku stríðsmenninir sóu sigurin sum tann fyrsti væleydnaði islamiski mótdráttteurin mótvegis vesturlendingum. Nógvir av teimum muslimsku hermonnunum fóru í allar ættir nú kríggið var liðugt, og soleiðis fekk Al-Quaeda eitt fjøltjóða og skapleyst net.

Í Afghanistan helt innanlandsstríðið millum ymisku bólkarnir fram. Í 1996 megnaði fundamentalistiski islamiski bólkurin Taliban at takað valdið. Mansjavinistisku Taliban royndu harðhent at stýra Afghanistan, men ruðuleikin og innanlandsstríðið varð ikki til at basa. Eftir at Taliban tværnoktaði at flýggja Osama bin Laden til Amerika eftir álopini 11. september vardi ikki leingi fyrr enn teir vóru riknir frð valdinum. Í dag royna ymiskir felagskapir at vísa Afghanistan á vegin til fólkaræði, men tað gongur striltið og innanlandsstríðið er torført at basa.

Megnar vesturheimurin at beina fyri muslimska yvirganginum? Tað er torført at ímynda sær, at kríggið móti yvirgangi fer at enda hastiliga – vesturheimurin hevur onga skotskivu at skjóta eftir.



Sáttmáli fyri 50-100 miljónir krónur:

# Atlantsflog risahál í Noregi

**– Hetta er størsti einstaki sáttmálin, sum Atlantsflog nakrantíð hevur gjørt, sigur Magni Arge. Stjórin vil ikki leggja høvdið á blokkin fyri, at sáttmálin í umsetningi er verdur 100 miljónir krónur, men tað er ikki óhugsandi. Tað veldst um, hvat Atlantsflog annars kann fáa burtur úr avtaluni**



*Atlantsflog hevur gjørt eitt risahál í Noregi. Avtalan millum føroyska flogfelagið og Aker Stord er í umsetningi verd eitt tal, sum liggur millum 50 og 100 miljónir krónur*

FLÚGVING
*Eirikur Lindenskov*
*Vilmund Jacobsen*
*eirikur@sosialurin.fo*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Hetta er fantastiskt, og hevur sera stóran týdning fyri Atlantsflog.

Tað sigur Magni Arge, stjóri í føroyska flogfelagnum, sum í harðari kapping hevur vunnið sáttmálan um flúgvingina av starvsfólkum hjá Aker Stord.

Stjórin í Atlantsflogi, Magni Arge, sigur, at fyribilssáttmálin, sum Atlantsflog og norska fyritøkan, Aker Stord, undirskrivaðu hósdagin um flutning av ferðafólki úr sunnara parti av Noregi til Alta í Norðurnoregi, merkir, at føroyska flogfelagið kemur at flyta eini 35.000 ferðafólk á hesi rutuni komandi tvey árini. Magni Arge sigur, at flúgvingin í Noregi byrjar væntandi um miðjan apríl og heldur fram til marsmánaða 2006.

– Talan verður í minsta lagi um einar 1400 flúgvitímar í hesum tíðarskeiði, men óhugsandi er ikki, at flúgvitímarnir verða nógv fleiri, nevniliga heilir 2800 tilsamans.

Luturin hjá Atlantsflogi verður at flúgva starvsfólk hjá Aker Stord, Aker Kværner Elektro, Kaefer IKM og Rosenberg Verft úr Stavanger og Stord til Alta. Seinni verður møguliga talan um at flúgva til aðrar floghavnir í Mið- og Suðurnoreg eisini.

Stian Vemmestad, sum er forstjóri hjá Aker Stord sigur, at tvinnar orsøkir vóru til, at Atlantsflog fekk sáttmálan:

– Atlantsflog var kappingarført í prísi, og so hevur felagið eisini sera royndar flogskiparar, sum eru vanir at flúgva í truplum veðurlíkindum, sigur hann.

### Størsti einstaki sáttmáli

Magni Arge sigur, at hetta er størsti einstaki sáttmálin, sum Atlantsflog nakrantíð hevur gjørt.

– Í peningi verður talan um í minsta lagi 50 miljónir krónur, sigur Magni Arge. Stjórin váttar, at hesar 50 miljónirnar byggja á tað minna tímatalið, sum er 1400, men gongur alt væl, er ikki óhugsandi, at umsetningurin verður munandi størri.

– Eg tori tó ikki at leggja høvdið á blokkin fyri, at sáttmálin í umsetningi er verdur 100 miljónir, tí tað veldst eisini um, hvat vit annars kunnu fáa burtur úr avtaluni, sigur Magni Arge.

### 20% uttanfyri

Hann vísir á, at nýggja avtalan saman við sáttmálunum um flúgving millum Ísland og Grønland og Danmark og Italiu, merkir, at umleið 20% av flúgvingini hjá Atlantsflogi nú liggur uttanfyri Føroyar og ávirkast tískil ikki av tí, sum eitt nú hendir í føroyska búskapinum.

– Sáttmálin kann eisini koma at merkja, at føroyskar fyritøkur og føroysk arbeiðsmegi fær munandi betri møguleikar at taka lut í virkseminum rundan um risastóru útbyggingina, sum Statoil stendur fyri í Norðurnoregi, vísir Magni á.

Hann ásannar, at Atlantsflog hevur fingið henda sáttmálan í lag, sum viðurkenning fyri tað arbeiði, sum bæði núverandi og fyrrverandi starvsfólk og leiðsla hjá felagnum hava lagt í at menna føroyska flogvinnu.

Atlantsflog og Aker Stord vænta, at fyribilssáttmálin um flutning verður endaliga undirskrivaður, 25. mars 2004.

Jan Mortensen, stjóri í vinnuhúsinum:

# Sáttmálin gevur møguleikar

**– Hetta er ein upplagdur møguleiki hjá vinnuni at sleppa framat risa arbeiðnum, sum fer fram í Norðurnorra, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, ið ætlar at skipa fyri felags, føroyskum átaki, tá Atlantsflog fer undir flúgvingina**

FLÚGVING
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Stjórin í Vinnuhúsinum, Jan Mortensen, fegnast um avtaluna, ið Atlantic Airways hevur gjørt um at flutning av ferðafólki úr sunnara parti av Noregi til oynna Melkoya uttanfyri Hammerfest.

Umfatandi byggingin hjá Statoil har á leiðini, sokallaða "Snøhvit" ætlanin, kastar sera nógv arbeiði av sær. Og nú ferðamøguleikarnir úr Føroyum gerast munandi betri, kann tað geva lata dyrnar upp fyri føroyskum fyritøkum og arbeiðsmegi.

Nú er sáttmálin hjá Atlantic Airways rættuliga nýggjur, men í Vinnuhúsinum hava tey longu tosað ítøkiliga um at gera eitt átak, har gjørt verður vart við føroyskar fyritøkur, Atlantic Airways byrjar flúgvingina.

– Eg haldi hetta vera ein upplagdan møguleika at gera vart við føroyskt vinnulív og føroyska arbeiðsmegi í samband við avtaluna hjá Atlantic Airways, sigur Jan Mortensen. Stjórin í Vinnuhúsinum vísir á, at nú minni arbeiði er í Føroyum kann tað vera kærkomið hjá føroyskum fyritøkum, sleppa tær upp í part í risa arbeiðinum hjá Statoil í Norðurnoregi. Eitt arbeiði, ið verður mett at kosta 45 milliardir norskar krónur.

### Samband við Statoil

Vinnuhúsið ætlar sær eisini at seta seg í samband við Statoil, fyri at bjóða føroyskar fyritøkur og arbeiðsmegi fram.

– Enn er ov tíðliga at siga, hvussu nógv kann fáast burturúr. Men einki er at ivast í, at føroyingar við sáttmálanum hjá Atlantic Airways nú hava fingið ein fyrimun, sigur Jan Mortensen, ið ynskir føroyska flogfelagnum tillukku við sáttmálanum.

Gunvør Balle, stjóri í Pam Offshore Services:

# Lopfjøl hjá føroyskum handverkarum

FØROYINGAR TIL NOREGS
*Jan Müller*



Avtalan, sum Atlantsflog hevur gjørt um flúgving av fólki úr Suðurnoregi til Norðurnoregs í sambandi við risastóru Snøvidútbyggingina, kann fáa sera hepnar avleiðingar fyri føroyskt vinnulív. Gunnvør Balle, stjóri í Pam Offshore Services sigur, at hetta kann vera lopfjølin fyri at fáa fleiri føroyskar sveisarar og elektrikarar o.o. í arbeiði í Noregi. Fyritøkan hevur longu góðar royndir við at senda síni fólk til at arbeiða í norsku oljuvinnuni, men steðgur hevur verið í í eina tíð. Nú sær hon avtaluna hjá Atlantsflog sum ein kærkomnan møguleika at taka hetta uppaftur. Talan kann blíva um at senda eini 10 til 20 fólk til Noregs at arbeiða helst í Hammerfest, har tey gera útgerðina til gassfeltið Snøvid, sum Statoil stendur fyri. Um væl vil til, kann talan blíva um enn fleiri handverkarar.

Gunnvør Balle sigur, at kappingin er hørð og verður hettta neyvan til nakað gullnám, men kunnu arbeiðsleysir føroyskir handverkarar fáa arbeiði í Noregi, so er nógv vunnið, og tað gevur so eisini møguleikan at koma inn í eitt arbeiði, sum kann byggjast út uppá longri sikt. Tað ræður um at fáa fótin inn um.

Pam Offshore er í samráðingum við Aker um at fáa føroyskar handverkarar at fara við Atlangsflog úr Føroyum og víðari til Noregs, har flogfelagið so skal flyta norðmenn til arbeiðis har norðuri. At kunna brúka rutuna hjá Atlantsflog er fyrsta fyritreytin fyri at hetta kann bera til. Tá verða ferðaútreiðslurnar ikki so stórar.

Pam hevur havt fólk í fleiri noskum projektum síðani 1998.